# Eisini Jenis og tey fyrireika seg til val



*Jenis av Rana stúrir fyri, at tað fer at eydnast at gera fullveldið til høvuðsmál í valstríðnum, men tað er ikki høvuðsmálið hjá miðflokkinum*

**Jenis av Rana sigur, at tað er blivið lættari hjá miðflokkinum hesa seinastu tíðina, enn tað hevur verið**

UPPSTILLING
*Áki Bertholdsen*

Sum løgtingsvalið nærkast, goyrist oftari og oftari um politiskar flokkar kring landið, sum hava uppstillingarfundir og gera valevnislistar til valið.

Men higartil tykist sum um miðflokkurin púra er dottin burturímillum, tí enn hevur onkiverið at hoyrt til hann í fyrireikingunum til valið.

Men tað er ikki tí, at hann ikki ætlar at stilla upp.

Tvørturímóti veitir Jenis av Rana, einasti tingmaður floksins, vissu fyri, at eisini miðflokkurin fer at stilla upp.

Og tað er eisini greitt, at hann fer at stilla upp í øllum valdømum, sigur hann.

Men hann sigur, at hjá miðflokkinum eru fyrireikingarnar til valið øðrvísi enn hjá hinum flokunum.

– Vit hava ikki lokalfeløg kring landið. Vit hava ikki so stóra fyrisiting, sum hinir flokkarnir, tí vit hava bara eina nevnd og hon leggur so uppstillingina kring landið til rættis.

Hann sigur, at tað verður í næstu framtíð, at flokkurin fer at gera valevnislistarnar kring landið.

Tað liggur fast, at bæði hann sjálvur og Tordur Niclasen fara at stilla upp..

Annars eru nógv nøvn upp á tal sum valevni, men hann vil ikki siga hvørji. Men talan er eisini um nógv nýggj nøvn, sigur hann. Hann væntar tó ikki, at flokkurin fer at hava fullar listar í summum av valdømunum.

### Lættari hesuferð

Annars hevur Jenis av Rana rættiliga góðar vónir til valið hesuferð.

– Eg vænti, at tað verður lættari at manna listarnar hesuferð, enn tað hava verið.

Hann sigur at tilgongd er til flokkin, tí fleiri hava vent sær til flokkin við tilboði um stuðul og til at stilla upp eisini.

– Eg havi ikki upplivað tað fyrr, men bæði í heyst og í vár hava fólk vent sær til okkara og boðið sín stuðul fram.

– Hetta er ein nýggj tíð. Tað er eggjandi og øll eru vælkomin í flokkin, sum annars taka undir við okkara sjónarmiðum, sigur Jenis av Rana. Vit hava brúk fyri øllum góðum kreftum, leggur hann afturat.

Tí hevur hann eisini góðar vónir um valið, hóast veljarakanningarnar ikki geva miðflokkinum nóg stóra undirtøku til at fáa umboð á ting. Og tað verður tað eisini hesuferð, tí vit hava styrkt flokkin, bæði í Eysturoy og í Suðurstreymoy.

- Tað er tað vanliga, men tað hilnast kortini, sigur hann. ?

- Eg dugi ikki at síggja nakrar orsøkir til stuðla aðrar flokkar enn okkara.

Annars ivast hann ikki í, at tað verða vælferðarspurningar, heilsuverk, sosialmál, umsorganin fyri teimum veiku og onnur, sum verða høvuðsevnið í valstríðnum.

Hann stúrir fyri, at tað fer at eydnast at gera fullveldið til høvuðsmálið, men tað er ikki okkara. Vit fara at føra fram, at tað grundleggjandi fyri vælferðina er álitið á várharra.

# Fyrsta stigið tikið til eitt eldrasambýli á Tvøroyri

**Mikudagin vóru umboð fyri býráðið og arkitektur og hugdu eftir øki á Tvøroyri til eitt eldrasambyli, men enn er langur vegur eftir á mál**

TVØROYRI
*Áki Bertholdsen*

Fyrstu stigini til at byggja eitt eldrasambyli á Tvøroyri, eru nú tikin.

Mikudagin vóru umboð fyri býráðið runt í kommununi, saman við Páll Lave, arkitekti á Arkitektavirkinum hjá Àrna Winther í Havn, runt í kommununi og hugdu eftir, hvørji øki vóru hóskilig at byggja eitt slíkt eldrasambyli á.

– Semja var um, at besta plássið at byggja tað á, er inni við Húsgarð, tað er beint uttanfyri vegin eystan fyri skúlan og ítróttarhøllina í Trongisvági, sigur Heri Mortensen, sum er næstformaður í sosialu nevnd hjá Tvøroyrar Býráð.

Har eigur kommunan eitt stórt stykki, sum liggur væl fyri, tí tað er slætt, útsýnið er gott og so liggur tað beint við skúlan og ítróttarhøllina, har pensjónistarnir hava høli frammanundan.

Hetta er sama stykki, sum undanfarna býráð hevði í huganum, tá ið tað arbeiddi við spruninginum um eldrasambýli, men val kom ímillum, áðrenn nakað hendi.

Arkitekturin skal nú gera uppskot um, hvussu húsið skal síggja út og gera nakrar kostnaðarmetingar.



*Mikudagin vóru limir í sosialu nevnd hjá Tvøroyrar Býráð runt í kommununi, saman við arkitekti og kannaðu, hvar tað er frægast at byggja eldrasambýli. Frá vinstru eru teir Sverri Midjord, Páll Lave, arkitektur, Bergur Bærendsen, nevndarlimur og Heri Mortensen, næstformaður í sosialu nevnd*

### Gongur ein tíð

Hóast stykkið, har eldrasambýli skal byggjast, er tað greitt, at tað fer at taka rúm tíð, áðrenn nakað eldrasambýli er veruleiki.

Tvøroyrar Býráð hevur sett 500.000 krónur av á fíggjarætlanini fyri í ár til at fyrireika byggingina fyri.

Men skal eldrasambýlið gerast, skulu størri upphæddir setast av tey komandu árini.

Heri Mortensen sigur tó, at landið letur stuðul til slíka bygging. Eldrasambýlið verður ein sjálvsognarstovnur og húsið verður tí eisini fíggjað við láni úr fíggingarstovnunum.

Hann vónar, at eldrasambýlið verður kann vera liðugt um eini tvey ár.



Runrig til Føroyar:

# Fyrireika listastevnuna

**Fyrireikingarnar til listastevnuna eru av álvara farnar í gongd, og nøkur av høvuðsnøvnunum eru funnin. Skotska rokkorkestrið Runrig skal spæla í Havn 3. august, og norski sálmasangarin Sigvart Dagsland er eisini boðin hendavegin. Tað ljóðar eisini, at arbeitt verður við at fáa Carolu úr Svøríki hendavegin**



*Høllin á Hálsi verður leygardagin 3. august karmur um stórfingna konsert við skotska bólkinum Runrig og Týr*

LISTASTEVNAN
*Stefan í Skorini*

Fyrireikingarnar til Listastevnu Føroya eru av álvara farnar í gongd. Fleiri av høvuðsnøvnunum eru funnin, og eitt tað áhugaverdasta navnið fyri ungdómin er skotska orkestrið Runrig.

Tað fer at spæla 3. august í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn. Hetta er eitt av fyrstu tiltøkunum á stevnuni, sum byrjar við einum braki.

Føroyski bólkurin Týr, sum hevur gjørt nógv um seg seinasta árið, fer at hita upp fyri skotska bólkin.

Runrig er upprunaliga frá Isle of Skye, sum liggur út fyri vesturstrond Skotlands, men hevur nú heimstað í Aberdeen. Bólkurin, sum er sera væl umtóktur í Skotlandi, hevur ein tjóðskaparligan boðskap í sínum tónleiki.

Birgir Kruse, sum samskipar Listastevnuna, sigur, at orsøkin til at Runrig og Týr eru settir saman á eini konsert er, at báðir bólkarnir í sínum tónleiki gera vart við, hvaðani teir eru, og teir nýta staðbundnan traditionellan tónleik í nýmótans rokktónleiki.

Fyrrverandi sangarin í bólkinum hevur roynt seg í politikki. Hann tók seg úr bólkinum og stillaði upp fyri tjóðskaparflokkin. Hann varð eisini valdur á ting í Skotlandi.

Eitt annað kent navn verður eisini við á listastevnuni. Tað er norski sangarin Sigvart Dagsland. Hann syngur mest gamlar og kendar sálmar hjá eitt nú Linu Sandell. Hetta eru klassiskir norðurlendskir sálmar og ikki nýmótans gospeltónleikur.

Sigvart Dagsland er úr Stavanger í Noregi, og Birgir Kruse sigur, at fyrireikararnir við vilja hava roynt at fingið samband við Stavanger í Noregi og Aberdeen í Skotlandi. Orsøkin er, at Tórshavnar kommuna hevur gjørt eina samstarvsavtalu við hesar báðar býirnar innan oljuvinnu.

Tí er tað upplagt eisini at fremja samstarvið á tí mentanarliga økinum.

### Carola?

Sagt verður eisini, at fyrireikararnir arbeiða við at fáa svensku sangarinnuna Carolu hendavegin til stevnuna.

Carola syngur mest gospeltónleik, og ætlanin er, at hon skal syngja saman við United Voices.

Tó er eingin avtala komin uppá pláss við Carolu. Tað kann tí væl vera, at henda ætlanin verður av ongum.

Væntandi fáa fyrireikararnir svar fyrst í mars mánaði. Vónandi verður tað ja.

Annars frætta vit, at Norðurlandahúsið skjótt fer undir sølu av atgongumerkjum til stevnuna, og ætlanin er eisini, at fólk skulu kunna bíleggja um internetið.

# Fáa væntandi longda varðhaldsfongsling

**Tveir menn, sum báðir eru skuldsettir fyri at hava smuglað og selt rúsevni, komu hósdagin fyri í Føroya Rætti. Tveir aðrir hava játtað seg sekar og góðtaka, at varðhaldsfongslingin verður longd uttan rættarfund**



*Stóra átakið hjá løgregluni móti rúsevnasølu og -smugling gongur sína gongd. Í næstu viku verður ákæra væntandi reist móti tveimum teirra, ið hava játtað seg sekar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

RÚSEVNI
*Stefan í Skorini*

Hósdagin klokkan 13 komu tveir menn, sum eru 27 og 35 ára gamlir, fyri Føroya Rætt. Teir eru skuldsettir fyri at hava smuglað og selt stórar mongdir av ólógligum rúsandi evnum. Teir vórðu tiknir 16. januar og hava sitið avbyrgdir síðani.

Ákærin sigur, at hon fer at krevja varðhaldsfongslingina longda í fýra vikur, har teir skulu sita avbyrgdir fyri ikki at hava møguleika at ávirka kanningararbeiðið hjá løgregluni í fongslinum og uttanfyri.

Væntandi fer dómarin at ganga kravinum hjá ákæranum á møti og leingja varðhaldsfongslingina í fýra vikur. Orsøkin til tað er, at málið er so álvarsamt, og nøgdirnar av rúsevnum eru so stórar.

Tann 17. januar vórðu fýra menn varðhaldsfongsladir í fýra vikur eftir umfatandi húsarannsóknir hjá løgregluni. Tveir teirra hava játtað seg sekar í teimum flestu skuldsetingunum, og teir hava báðir góðtikið, at varðhaldsfongslingin verður longd uttan rættarfund. Teir verða tí ikki framstillaðir, hóast freistin fyri varðhaldsfongslingini er úti.

Málini um hesar báðar, sum hava játtað seg sekar, koma væntandi fyri í Føroya Rætti í komandi viku. Ákærin fer aftur tá at biðja um rættarfund fyri afturlatnum hurðum, tí kanningararbeiðið hjá løgregluni ikki er liðugt.

Orsøkin til at hesir báðir menninir, sum eru 29 og 33 ára gamlir, koma fyri rættin longu nú er, at teir hava játtað seg sekar. Kanningararbeiðið tekur altíð longri tíð, um teir skuldsettu ikki játta.

# Ákærin krevur bót

**Skiparin á hetlendska trolaranum Maranatha noktaði at taka við sektaruppskotinum frá fútanum, og tí er hann nú komin fyri rættin. Hann noktar seg sekan**

FISKISKAPUR
*Stefan í Skorini*

Skiparin, 34 ára gamli Angus Cumming, er ákærdur fyri brot á lógina um vinnuligan fiskiskap og fyri brot á kunngerðina viðvíkjandi fiskiskapi hjá ES-skipum í føroyskum sjógvi.

Hann skal í fyrsta lagi ikki hava boðað frá eftir galdandi reglum, at hann var komin í føroyskan sjógv. Í øðrum lagi er hann ákærdur fyri at hava trolað á eini leið vestanfyri Mykines, ið er stongd alt árið.

Skiparin noktar seg sekan í øllum ákærum. Hann sigur, at hann royndi at senda eitt telex til Fiskiveiðueftirlitið, tá hann fór um markið, og at tey 1.000 pundini av fiski í lastini eru fingin í ES-sjógvi.

Fiskifrøðingar, sum vóru umborð, mettu tó, at fiskurin var nýfiskaður. Harumframt hava menn á línubátinum Sigmundi sæð Maranatha hava trolið úti á stongdu leiðini.

Ákærin krevur, at skiparin fær bót, og at hald verður lagt á veiðu og fiskireiðskap fyri tilsamans knappar 300.000 krónur.

Tá blaðið fór til prentingar hósdagin, hevði dómarin ikki tikið støðu í málinum.




*Hetlendski trolarin hevur síðan mánadagin ligið við bryggju. Skiparin noktar seg sekan í ákærunum*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*